


# Blaðútgáva í áttiti ár uttan steðg

SOSIALURIN 80 ÁR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hátíðardámur er í Vágsbotni í dag, nú liðin eru áttati ár síðani, at Sosialurin kom út á fyrsta sinni. Til tess at hátíðarhalda hetta býður Sosialurin øllum lesarum, haldarum, lýsarum og viðskiftafólki annars til móttøku í Miðlahúsinum í morgin, fríggjadagin millum kl 15 g 17.

Nógv er broytt, síðani Sosialurin á fyrsta sinni kom út hendan týsdagin 24. mai í 1927. Tað vóru menninir aftan fyri Javnðarflokkin, sum gjørdu hesa roynd til tess at vinna flokkinum eitt málgagn. Tí uttan málgagn bar ikki til at vinna sær sæti á tingi. Umboð á tingi fekk flokkurin á fyrsta sinni árið eftir.

Frammanundan vóru tveir politiskir flokkar - Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, og teir høvdu hvør sítt málgagn, Dimmalætting og Tingakross. Tað er ein sannroynd, at eingin politiskur flokkur fekk fótin fyri seg uttan eitt málgagn - líka til útvarpið kom í 1957. Framburðsflokkurin hjá Kjartan Mohr er fyrsti flokkur, sum hevur vunnið sær sæti á tingi uttan eitt málgagn.

Í dag er støðan øðrvísi. Bæði tey fyrrverandi politisku málgagnini, Sosialurin og Dimmalætting hava slitið seg leys frá flokkinum - og Javnaðarflokkurin hevur selt Sosialin.

Politikarar og valdsharrar annars hava í dag lættari atgongd til miðlarnar og koma sostætt lættari á tal við veljaran, meðan miðlarnir kýta seg røkja kritiskan og óheftan tíðindaflutning.

Sosialurin var tað seinasta politiska málgagnið hjá javnaðarrørsluni í kongaríkinum. Sosialurin var eisini tað einasta blaðið, sum til tað síðsta varðveitti navnið Sosialurin, sum er ein stytting av upprunaliga navninum, »Føroya Social-Demokrat« (tey donsku høvdu navnið »Social-Demokraten«).

Helst hevur navnið »Sjalurin« ligið so langt frá floksnavninum - og er tí varðveitt.


·FØROYA·
SOCIAL·DEMOKRAT
Grønland.

*Tann fyrsta forsíðan á Sosialinum, sum kom á gøtuna tann 24. mai í 1927*


Sosialurin
Nr. 97 • mikudagur • 23. mai 2007 • 81. árgangur • Kr. 15,00

Bankaverkfall:
Skrædnar samstarvið? Síða 8-9

Búskaparráðið:
Bjørn Kalsø økir stættamunin Síða 13

planet.fo
Sangskrivarar undir sjóneykuna
HØGNI LISBERG
GUÐRIÐ HANSDÓTTIR
OG LENA ANDERSSEN
www.tele.fo

- Tað er at kalla í hvørjum dysti at spælarar heilt tilvitað niðurgera onkran av útlendsku spælarunum, siga Jan Dam og Jákup Eli Olsen, fótbóltsvenjarar. - Slíkur atburður eigur at verða revsaður hart, tí vit bera ótta fyri, at hetta er eitt keðiligt rák, sum er í øllum føroyska samfelagnum, siga teir um rasistiska atburðin, sum hevur verið innan fótbóltin seinastu árini

Ítr 16-20

SKAMMAST SUM FØROYINGAR

SUZUKI
Øll MC-útgerð
MC-solan
Skemmingsgøta 23 · Tel. 311 101
Fax 313 763 · www.mc-solan.fo

Vit hava lyftir til øll endamál
Sjálvkoyrandi 4WD diesel lyftir røkka 18 metur
Trailaralyftir røkka 15 metur
Sax-lyftir røkka 12 metur
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK · TEL 31 56 00

DEKKTILBOÐ
DEKK.FO
DEKK SENTRIÐ
Tel. 320 500 | 475 500

Auto
TAXI
3-1-1-2-3-4

*...og tann seinasta forsíðan av Sosialinum, tann 23. mai 2007*